**Rolf Guttesen:**

# Dokumentatión:
# *Listin hjá Eberhardt kommandanti 1745*

## Dokument-referenca:
Eberhardt, J.M. (1745) : *Liste; Junge Manschaften von 15 bis 50 Jahr*e. Føroya Landsskjalasavn: Indberetninger til Stiftamtmanden, 1745-56. Savnsnr. 15-xv11. <history.fo, dd.mm.aa>

Tittulin í referencuni er gjørdur og tillagaður eftir innganginum hjá Johan Michael Eberhardt á sjálvum listanum.

## Um dokumentið:
Listin er lagdur út á History.fo heimasíðuna, sum fotografisk kopi av originalunum á Landsskjalasavninum, sum liggja í Amtsarkivinum, undir Indberetninger til Stiftamtmanden, 1745-56. Savnsnr. 15-xvii-pk. Í hesi eskju er eitt legg fyri 1745, og hetta er bræv er 3 síður, merkt nr 7. Listin sum er hjálagdur er 11 síður.

- **Hvør er við á listunum?**

Listin er skjal, ið er partur av eini rapport, sum Johan Michael Eberhardt, kommandantur á Skansanum 1743-57, sendi stiftbefalingsmanninum Henrich Oksen. Í rapportini sigur Eberhardt, sum skrivar á týskum, um Listan:

*"… ich habe… dass Land herum gereist, auch die jungen Manschaften, und die jenigen so keine Höfe oder Land von Ihre. Königl. Maytts zur heuer Besitzen von 15 bis 50 Jahren auf gezeichnet, Wobeÿ auch eine Liste mitfolget."*

Ella tillagað á føroyskum: "Eg ferðaðist um landið, og skrivaði upp allar ungar menn, 15 til 50 ára gamlar, og teir ið ongan garð ella jørð frá Kongi hava í ár; ein listi er viðlagdur." Tað er ikki púra klárt, hvat hann í hesi stuttu frágreiðing meinar við. Hvør er undantikin? Hvørja støðu hava óðalsbøndur, til dømis? Hvussu við húskallum hjá kongsbøndrum?

Á sjálvum listanum skrivar hann á fyrstu síðu:

*" Derer Jeningen Jungen Manschaften so sich auf dem Lande* Færöe *befinden und aufgezeichnet worden, und zwar in* Strömöe Sÿssel *von 15 biss 50 Jahr auch nicht von Ihre Königl. Maÿtt*[en] *Land zur Jener besitzen, wie folgt."* Tað kann undra, at hann nevnir Streymoyar sýsslu her, forkláringin er helst, at hann byrjar við hesi sýslu á somu síðu, sum hetta er skrivað. Stubbin sigur ikki so nógv meira enn tað, ið er skrivað omanfyri. Eg havi sum eina kontroll-roynd leysliga samanborið nøvnini í Norðstreymoy, ið eru at finna í bókini hjá Degn: Færøske

Kongsbønder. Men einki funnið. So menn, sum sita við kongsfesti eru vissuliga ikki við.

- **Fólkatalið 1745?**

Listin er skipaður í sýslur og bygdir, og hvør persónur hevur eitt raðtal. Har aftrat er aldurin á persóninum skrivaður, "*wie alt*". Hann kemur á seinastu síðu til raðtal 704, men skrivar at summurin er 713. Hetta kemst av, at tølini 90 til 98 eru (av misgávum?) skrivaði tvær ferðir.

Her eru sostatt nøvnini á 713 dreingjum og ungum monnum í 1745. Í fólkatalspyramidum frá teirri tíðini eru 20-25 % menn í aldursbólkinum 15 til 50 ár. Um vit her roknað við 23 %, sum eitt dømi, koma vit til eitt samlað fólkatal uppá umleið (713 x 100 / 23) = 3.100. Út frá fólkateljingini, sum var í 1769 og øðrum keldum, meti eg, at fólkatalið man hava verið umleið 4.500. Um allir ungir menn vóru taldir við, áttu eftir hesum roknihátti at verið ca. 1.035, so her mangla gott 300. Listin er sostatt ikki fullfíggjaður, skilt á tann hátt, at ikki allir menn í nevnda aldurbólki eru á listanum. Men tað hevur heldur ikki verið ætlanin hjá Eberhardt. Men listin hevur hóast tað stórt virði, tí hetta man vera ein tann elsti listin, sum higartil er funnin, har so nógv nøvn og allar bygdir eru við.

- **Ymiskt viðvíkjandi listanum**

Nøvnini á listanum eru stavaði umleið sum vanligt var í kirkjubókum og øðrum skjølum. Kanska er tað eitt týkst árin, at langir vokalar verða fylgdir av einum –h-, fyri at vísa hetta ljóðvirði. Ole verður: Ohle, Jon verður John.

Bygdanøvnini hava í støðum týskan stavimáta: Thorshavn verður Thorshagen; Hove verður Howe (tí –v- úttalast sum –f- á týskum). Nøkur tykjast eisini at liggja nærri føroysku úttaluni, enn gamalur danskur skrivimáti var: ikki Hestøe, men Hæste; ikki Skuøe, men Schue.

- **Hvat skuldi listin brúkast til?**

Í fylgibrævinum, sum partvís er endurgivið her, stendur, at Eberhardt hevur ferðast um landið og roynt at fingið menn at "exercera" og brúka hvalvákn sum vápin. Men illa hevur borið til. Hann spyr tí Stiftbefalingsmannin, um tað er nóg mikið, at hann inspicerar vápnini, ella um hann eisini skal royna at exercera? Listin man tí vera ein roynd at uppstilla eina 'heimaverju'. Vápnaførir menn, sum í undantaksstøðu kundu takast burtur úr framleiðsluni ella dagliga arbeiðinum.

RG 31.12.2009